

# HEYSTFRÍTÍÐ Í DANMARK

## Í heystfrítíðini bjóðar Smyril Line í samstarvi við Danland føroyskum familjum at fara til Søndervig og Bork Havn

Í samstarvi við frítíðarveitaran Danland hevur Smyril Line sett saman eitt gott tilboð til ta føroysku familjuna. Smyril Line bjóðar eitt uppihald í eina viku fyri fýra fólkum við bili. Talan kann bæði verða um tvey vaksin og tvey børn, ein vaksnan og trý børn, trý vaksin og eitt barn, ella bara fýra vaksin.

Tað er líkamikið, bert talan er um fýra fólk. Fráferðin er hósdagin 7. oktober, og heimferðin er leygardagin 16. oktober. Ein kann velja ímillum at fara til frítíðarmiðdepilin í Bork Havn, ella til frítíðarhotellið í Søndervig. Bæði støðini liggja í Vesturjútlandi, sum er strandaríkasta økið í Danmark, og hartil náttúruvakurt. Talan er um tvey ógvuliga góð tilboð. Ein ferð fyri fýra fólk til Danland Bork Havn kostar úr 7.290 krónum. Vanligi kostnaðurin er annars 9.190 krónur. Ein ferð fyri fýra fólk til Danland Søndervig kostar úr 9.590 krónum. Vanligi kostnaðurin er annars 11.490 krónur. So her er talan um upphæddir sum muna.

Umborð á Norrønu verður eisini talan um eitt matartilboð, har ein kann spara heili 16 prosent. Bæði morgunmatarbuffét og kvøldarbuffét verður at fáa fyri einans 199 krónur. Smyril Line leggur stóra herðslu á, at tann góða ferðin byrjar longu tá ein kemur umborð á Norrønu, og er at passa sær løðir, so ein kann verða millum teirra, sum sleppa at halda heystfrítíð við bili í Vestur-Jútlandi. Rindast skal við bílegging. Pengar verða ikki endurrindaðir, aftaná ferðin er bíløgd.